Sosialurin

# VARPIÐ

TELEVARPIÐ



Tv3
Sunnudag 9. kl. 20.00

## Elsker dig for evigt

**Danskt drama um kærleika og lívsins veikleikar við Mads Mikkelsen og Paprika Steen. Cecilie og Joachim eru forelskaði og skulu giftast. Men ein álvarslig bilvanlukka broytir alt. Førarin í hinum bilinum, ið rennur á Joachim, er Marie. Hon er gift við Niels, og saman eiga tey trý børn.**



SvF • Sunnudag 9. kl. 20.00

## Leivssjóð 5

So er "Leivssjóð" aftur á skránni. Eftir ein steðg í ein góðan mánað, verður nú herjað á aftur undir eitt sindur broyttum karmum. "Leivssjóð" verður á skránni hvørt sunnukvøld frá 9. desember til endan av januar. Sostatt fær Leivur Hansen ikki færri enn 24 gestir á gátt í teimum 8 sendingunum, ið eru fyri framman, umframt gestasolistar. Tríggir teir fyrstu gestirnir verða Sigrið Sivertsen, Hilmar Jan Hansen og Kitty May Ellefsen. Solistur er Uni Reinert Debess.



Dr1 • Mánadag 10. kl. 19.00

## Michael Palin i det nye Europa

Palin kemur til Gdansk í Póllandi. Tað var her 2. Veraldarbardagi brast á, tá ið eitt týskt krígsskip skeyt eftir eini pólskari herstøð. Eitt sindur sunnanfyri Gdansk liggur skipasmiðjan, har ein ungur elektrikari fyrst í 80unum stovnaði óhefta arbeiðarafelagið Solidaritet. Palin hittir fyrrv. forsetan Lech Walesa.

**Fríggjadagur 7. desember 2007**

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**